Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Lindin Leygarkv. kl. 20.00

## Kunningar- og stuðulssending fyri Lindina:

Komandi leygarkvøld í Lindini kl. 20.00, verður um Lindina og tað fjølbroytta virksemið, ið gongur út frá henni. Vit fara at frætta um gongdina higartil, um framtíðarætlanir, um nýggju vetrarskránna, um tørvir- og tú verður eggjaður at verða við í arbeiðinum.

Fyri framman liggur víðkanin til m.a. Vágoynna, nýggjar og broyttar sendingar verða á vetrarskránni, og greitt verður frá dreymunum um skjótt at kunna senda allan sólarringin, til allar bygdir, og út um landoddanar.

Fíggjarliga grundarlagið undir virkseminum eru sjálvbodnar gávur. Javnt við víðkaða virksemið er tørvurin á stuðlum nógv vaksin, og leygarkvøldið fara vit at eggja teg at stuðla, av nýggjum ella við at hækka stuðul tín. Í hesum sambandi verða stórir vinningar lutaðir millum stuðlarnar, bæði verandi og nýggjar. Talan er um uttanlandsferðir, vikuskiftir á gistingarhúsum, gávubrøv o.a.

Lindin Mánadagin kl. 13.30

## »Her og har«

Nýggj sending í Lindini við Dánjal á Dul Jacobsen.

Hvønn mánadag kl. 13.30 er sendingin »Her og har« at hoyra á Lindini. Hetta er sending, har Dánjal lesur tilfar upp úr ymiskum bløðum og nýggjheitsbrøvum bæði heimligum og útlendskum. Til ber at senda tilfar til sendingina á e-mailadressu: pastor@gospel.fo. Eisini kanst tú ynskja tær ein sang, um tú sendur mail til nevndu e-mailadressu. Kravið er tó, at tú sendir eina frágreiðing um, hví tú ynskir júst tann ávísa sangin ella greiðir frá onkrum í samband við sangin.

Rás 2 Mánakvøldið kl. 20.00 og mikudagin kl. 15.00

## Keldan - eitt megnarverk!

Hetta vóru fólk flest samd um aftaná vígsluhátíðina seinasta vikuskiftið.

Rás 2 sendi beinleiðis alt vikuskiftið frá Kelduni í Skálafirði, tá nýggi bygningurin varð vígdur. Í tí sambandi vóru gjørdar samrøður við Jastrid og Paula Høj samkomuleiðarar, Jógvan Martin Høj og Jóan Paula Jacobsen, limir í elstaráðnum, Regin Jacobsen fíggjarleiðara og Gittu og Jonhard Joensen limir í Kelduni.

Hesar samrøður verða nú endursendar, og tey greiða m.a. frá søguni hjá Kelduni, um arbeiðið uppá nýggja bygningin, hvørjar framtíðarætlanir tey hava og eitt sindur frá teirra lívið. Tey vísa á allan hátt fyrimyndarligt samanhald, offurvilja og áhaldni, og hetta hevur borið ávøkst. At enda hoyra vit brot frá talum og heilsum frá vígsluni.

Vit hoyra eisini tónleik millum samrøðurnar.

ÚF Leygardagur kl. 19.05:

## Leygarkvøld í Atlantis

Komandi leygarkvøld fer hin fyrsta av fýra undirhaldssendingum, ið verða sendar beinleiðis úr Atlantis, av bakkastokki. Á skránni verður talkshow, undirhald og musikcafé. Fyrsti gesturin verður Kristian Fríðrik Olsen, ið hevur roynt eitt sindur av hvørjum. Prátað verður við Kristian Fríðrik, eins og aðrir gestir eisini støkka inn á gólvið.

Leif Waag Høgnesen er royndur hermari og leygarkvøldið fer hann at herma eftir nøkrum av sínum »yndisoffrum«. Eisini verður nomið við eitt nú herming, íblástur og fyrimyndir.

Á musikcaféini vitjar Steinvør Fonn, og onki undirhaldskvøld úr Atlantis uttan áskoðarar og orkestur, orkestrið verður mannað av Magna Husgaard, tangentar, Ólavi Øster, guitar, Eyðuni Nolsøe, bass, og Jens Paula Joensen, trummur. Vertur verður Gunnar Nolsøe.

ÚF Mikudagur kl. 16.03·

## Trý ár í Nepal

Tommy Petersen var í trý ár saman við familjuni í Nepal í Himmalaya. Hann arbeiddi hjá Danida-hjálparfelagsskapinum saman við fólkum úr fleiri øðrum londum. Nepal er millum tíggju tey fátækastu londini í heiminum, men Tommy Petersen sigur, at ongantíð hevur hann hitt so blítt fólkaslag. Helgi Jacobsen leggur til rættis.

Sendingin varð fyrru ferð send 9. apríl.

Á 3+ hósdagin 16. september kl. 20.00

# Just Cause



*Sean Connery í leiklutinum sum sakførarin, Paul Armstrong*

Just Cause er spenningsfilmur frá 1995, ið snýr seg um ein sakførara, sum fer at kanna í einum átta ára gomlum rættarmáli, har ein ungur littur maður varð deyðadømdur. Men spurningurin er um maðurin, sum situr á deyðsgongini er sekur. Við í filminum eru so kendum nøvnum sum við Sean Connery, Laurence Fishburne og Ed Harris

Í Everglades í Florida verður ein 11 ára gomul genta funnin myrd. Í lítla býnum Ochopee verður ein syndabukkur skjótt funnin. Ungi svarti Bobby Earl verður handtikin av harðligum løgreglumonnum. Og innan eitt samdøgur er farið hava teir, við harðskapi og russiskari roulette, noytt eitt játtanarskriv burturúr tí unga Bobby Earl. Hann endar á deyðsgongini. Átta ár seinni situr Bobby Earl enn í deyðsklivanum og bíðar eftir endaligu revsingin. Hann setir seg nú í samband við juraprofessaran av Harvard, Paul Armstrong, ið verður leiktur av Sean Connery. Armstrong fer til Florida og fer undir at kanna málið. Hann gerst skjótt greiðir yvir allar teir leysu endarnar, sum stinga seg upp í málinum. Og aftur at hesum er løgreglan sera lítið samstarvssinnað. Løgreglumaðurin Tanny Brown, ið verður leiktur av Laurence Fishburne, vil hava Bobby Earl í elektriska stólin sum skjótast. Armstrong sær so við og við, at hesin sjálvrættvísi og harðligi løgreglumaðurin hevur ein týðandi leiklut í málinum um Bobby Earl. Og í grannaklivanum hjá Bobby Earl situr tann sinnissjúki Blair Sullivan (Ed Harris), ið sigir seg hava týðandi vitan um, hvør tann seki er. Men lítið hjálpir Bobby Earl. Tó, vend kemur í søgugongdina í filminum, tá tað vísir seg, at tað als ikki var av tilvild, at tað júst varð Armstrong, ið Earl setti seg í samband við.

Filmurin, ið kemur undir "thriller"-filmsgreinina, er mest róstur fyri framførslurnar hjá Sean Connery og Ed Harris. Sean Connery er sannførandi sum altíð og Ed Harris, ræðuligi psykopaturin í grannaklivanum hjá Bobby Earl, kundi fingið sjálvan Hannibal Lector at krimpa tærnar. Samrøðurnar millum sakføraran og psykopatin eru avgjørt millum hæddarpunktini í filminum.



*Just Cause - um ein deyðadømdan, ið sigir seg vera ósekan, og um sakførara hansara*



FILMSTEIGURIN

# Mean Girls

Cady Heron helt, at hon flutti burtur frá ódjórum, tá hon sum 15 ára gomul flutti aftur til USA, eftir at hava verið í Afrika saman við foreldrum sínum í drúgva tíð. Nú kemur hon sum 15 ára gomul aftur í skúla, og her fær hon annað at vita.

Skjótt kemur hon nevniliga eftir, at tað er her, at veruligu rovdjórini eru. Torgreiðar óskrivaðar lógir um, hvat er hot og ikki, og stakkals tann, sum brýtir hesar lógir. Cady fær tó góða hjálp frá »skúlans drotning«, Regina, sum er tann, sum veruliga ger av, hvørjar eru við og ikki, men tá Regina steðgar einum forholdið millum Cady og gamla sjeikin hjá Reginu, kemur vátt í reiðrið.

Cady setir sær nú fyri at yvirtaka leiklutin hjá Reginu, og skjótt sæst, at Cady eisini dugir tær skitnu metodurnar. Talan verður um eitt stríð um at vera tann besta á skúlanum, og ongar reglur eru fyri, hvat er loyvt og ikki.









Frumsýning
Fríggjadagin 10.09. kl. $21^{00}$ Fríggjadagin 10.09. kl. $23^{15}$
Leygardagin 11.09. kl. $21^{00}$ Leygardagin 11.09. kl. $23^{150}$
Sunnudagin 12.09. kl. $20^{30}$ Sunnudagin 12.09. kl. $22^{45}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.
Fríggjadagin 10.09. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 10.09. kl. $18^{30}$
Leygardagin 11.09. kl. $17^{00}$ Leygardagin 11.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $16^{30}$ Sunnudagin 12.09. kl. $18^{00}$




Við enskari talu og donskum teksti – Billettprísur: 55,- kr.
Fríggjadagin 10.09. kl. $19^{00}$ Fríggjadagin 10.09. kl. $20^{30}$
Leygardagin 11.09. kl. $19^{00}$ Leygardagin 11.09. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $18^{30}$ Sunnudagin 12.09. kl. $20^{00}$




Fríggjadagin 10.09. kl. $22^{45}$ Leygardagin 11.09. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 12.09. kl. $22^{15}$

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.